Heilsuverk Føroya

2016

Heilsuverk Føroya



# PKU-screening fyri CTD

## Eykascreening 4 vikur eftir føðing

**Eyka blóðroynd fyri CTD** (Carnitin Transporter Defekt)
Fyri at tryggja at CTD-kanningin av nýføddum verður meira álítandi, fáa allir nýføðingar tilboð um eyka blóðroynd 4 vikur eftir føðing fyri at kanna karnitininnihaldið í blóðinum.

**Bakgrund**
Orsøkin til hesa endurkanning er, at royndir hava víst, at karnitininnihaldið í blóðinum hjá nýføðingum, tá vanliga PKU-royndin verður tikin 2-3 dagar eftir føðing, kann vera ávirkað av karnitininnihaldinum hjá mammuni. Tað er tí ein ávísur vandi fyri, at vanliga PKU-royndin ikki megnar at staðfesta CTD hjá nýføðingi.
Ávirkanin frá mammuni hvørvur eftir nøkrum vikum, og er nýggja skipanin við eyka blóðroynd eftir 4 vikum sett í verk fyri at tryggja, at øll børn, sum hava CTD, fáa staðfest sjúkuna, so tey kunnu fáa rætta heilivágin við karnitinískoyti.



**Mannagongd**
Áðrenn farið verður av føðideildini, verður blóðroyndarseðil útflýggjaður tykkum. Tað er ikki neyðugt at bíleggja tíð. Tit kunnu bara koma á Rannsóknarstovuna á Landssjúkrahúsinum, Klaksvíkar- ella Suðuroyar Sjúkrahúsi umleið 4 vikur eftir føðing. Sí upplatingartíðir niðanfyri.

**Svar**
Nýggja blóðroyndin verður send til Keypmannahavnar til kanningar. Um staðfest verður óvanliga lágt karnitininnihald, fáa tit beinleiðis boð frá lækna um at koma til nærri kanningar á Landssjúkrahúsinum.

**Upp- og afturlatingartíðir kring landið**

**Landssjúkrahúsið**
Ambulatorium í Útistovu (Blái bygningur)
gerandisdagar kl. 08:00-11:00

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
Á sjúkrahúsinum gerandisdagar kl. 08:00-10:00
Á Læknamiðstøðini í Gøtu hósdag kl. 08:15-09:30
Á Læknamiðstøðini í Runavík týsdag kl. 08:30-10:00

**Suðuroyar Sjúkrahús**
Á sjúkrahúsinum gerandisdagar kl. 08:00-13:00
Á Heilsumiðstøðini í Vági týs- og hósdag kl. 09:00-11:00